

Transocean Spitsbergen er farin at bora á Bister. Mynd: Westcon

# Faroe Petroleum er byrjað at bora leitibrunn í Norskahavinum

**Jógvan Hugo Gardar**

28.04.2015 - 09:10

Oljan.fo

Faroe Petroleum boðar í morgun frá at boringin av Bister leitibrunninum í Norskahavinum er byrjað. Faroe Petroleum eigur 7,5 prosent av leitiloyvinum. Bister leitimiðið liggur á sama teigi sum Hyme framleiðslueindin, og har Snilehorn fundið varð gjørt í 2013.

Eisini liggur teigurin tætt við Njord framleiðslueindina, sum Faroe eisini eigur 7,5 prosent í. Bora verður eftir kolvetnum í somu jarðarløgum, sum Hyme og Snilehorn keldurnar eru, tí seismiskar kanningar benda á, at Bister leitimiðið líkist hesum báðum keldunum.

Statoil, sum eigur 35 prosent av loyvinum, er fyristøðufelag, og tað verður Transocean Spitzbergen boripallurin, sum verður nýttur til boringina. Hini feløgini, sum luttaka í

boringini, eru GDF Suez (20 prosent), E.ON (17.5 prosent), Core Energy (17.5 prosent) og VNG (2.5 prosent).

Havdýpið har borað verður er 260 metrar.

Graham Stewart, forstjóri, sigur í viðmerking, at felagið er fegið um, at Bister leitibrunnurin nú verður boraður, sum ein uppfylgingarbrunnur til tað týðandi Snilehorn fundið á sama loyvi og nær við Njord undirstøðukervi.

Hann leggur afturat at í komandi mánaðum eisini ætlanin at bora tann fyrra av tveimum uppfylgingarbrunnum á Blink og Boomerang leitimiðunum, ið liggja tætt við stóra Pil fundið, har Faroe Petroleum eigur 25 prosent av loyvinum.

- Faroe Petroleum er tað mest virknað felagið í Noregi, sum er skrásett á keypsskálanum í London. Hóast torførar marknaðumstøður, miðjar vit eftir vøkstri í 2015 við eini boriætlan, ið er fult fíggjað, og sum fær fyrimunir av norsku leitiskattaskipanini, sigur Graham Stewart.